# Jomfrúferð við heimsins

**Fyri 28 ára gomlu Sáru Olsen av Tvøroyri var árið 2006 serstakt og hendingaríkt. Eitt ár sum hon altíð fer at minnast aftur á við einum smíli. Tað var árið, tá ið hon blev gift, og árið har hon legði leiðini út í stóru verð á jomfrúferð við heimsins størsta bingjuskipi**

## Samrøða



Tóra Effersøe Mortensøe




*Risastóra skipið hjá A. P. Møller, Emma Mærsk, sum fær sjey systurskip komandi árini*

Mamma Mia... Soleiðis hugsaði Sára Olsen, tá hon sá risastóra bingjuskipið, Emmu Mærsk, ið lá við bryggju í Singapor. Hetta var fyrsta oktobur 2006. Dagin fyri hevði hon sitið spent, vónargóð og glað men eisini ótolin umborð á lítla Atlantic flogfarinum á veg til Danmarkar. Hon visti ikki, hvat hon fór at uppliva tær næstu seks vikurnar, men tá hon umleið eitt døgn seinni stóð á bryggjuni í Singapor, ivaðist hon ikki í, at hon var partur av nøkrum serligum. Tað var ikki bert heimsins størsta bingjuskip, hon skuldi sigla við, men eisini fyrsti túrur hjá skipinum. Og so var Sára einasti gestur umborð á túrinum frá Asia til Evropa.

Sára skuldi vera gestur hjá manni sínum Gunnari Olsen, sum var annar meistari á fyrsta túrinum hjá stóra Mærsk skipinum. Sjálvt um Gunnar skuldi arbeiða næstan allan túrin, so fóru næstu vikurnar at vera eitt slag av brúdleypsferð. Tey vóru blivin hjún tveir mánaðir áðrenn fráferðina, so í allar mátar var talan um ein serligan túr.

Tá Sára kom umborð hevði Emma Mærsk verið á ferð í fimm vikur. Hon legði frá bryggju í Århus í septembur 2006 við kós ímóti Asia. Og næstu vikurnar gekk leiðin aftur til Evropa.

**Trygdin umborð**

Tað skal ikki vera nøkur loyna, at Sára stúrdi fyri túrinum upp eftir landgongubrúnni.

"Landgongubrúgvin er meira enn 30 metrar, og tá eg gekk upp eftir henni fet fyri fet, føldi eg, at hon sveiggjaði spakuliga frá síðu til síðu. Eg var so nervøs, hugsaði bara, at eg mátti royna at lata sum um, at eg hevði roynt hetta áður. Ha ha. Men eg kom tíbetur umborð í øllum góðum," staðfestir Sára.

Tá viðførið var komið uppá pláss í stásiliga kamarinum, og Sára hevði

Sosialurin